tíðindarblaðið SOSIALURIN
Nr. 18 – 27. Januar 2000

Jan Müller 26.01.2000 (16:18)

# Thor í Hósvík trygdar- og umhvørvis góðkenning

Jan Müller

Felagið hevur í 1999 lat nógva orku í at fáa góðskuskipan uppbygda við atliti ti ISO 9002 certifisering.
Sum partur av hesum arbeiði er arbeiðið umborð lagt til rætis samsvarandi ISM-Coduni. Felagið hevur mett ISM-coduna at verða ein neyðugur partur av eini ISO 9002 góðkenning fyri skip, sum skal røkja tænastur innan offshorevinnu, herundir flutning av fólki.
Thor sigur tíðindaskrivi, at felagið var ISM-certifiserað av Norsk Veritas og roknar felagið við, at ISO 9002 certifiseringin verður liðug innan 1-2 mánaðir.
Sambart ISM reglunum (International Safety Management) verður kravt, at eitt reiðarí og skip tess verða rikin ítráð við eina góðkenda trygdarstýringsskipan. Henda skipan er medvirkandi til, at manningarnar luttaka í tí orðaðatrygdar- og umhvørvispolitikkinum á ein munagóðan hátt. Í seinasta lagi 1. juli 98 skuldu øll ferða-, tanga- ogbulkskip og teirra reiðarí verða ISM-certifiserað. Onnur skipasløg skulu verða certifiserað í seinasta lagi 1. juli 2002.
Thor í Hósvík ger annars eitt stórt arbeiði fyri at vera við í komandi oljuleiting við Føroyar. Sum er luttaka skipini hjá reiðarínumí frálandavinnuni í øðrum londum, eitt nú so langt burturi sum í Vesturafrika. Men teir hava so eisini arbeitt í Norðsjónum umframt her um okkara leiðir. Nú 1. útbjóðingin stendur fyri framman vilja tey hjá Thor verða væl fyrireikað, og her kemur ISM - certifiseringin inn sum ein týðandi faktorur.
Felagið eigur í dag 5 skip. Talan er um bæði fiskiskip og hjálpar- og vaktarskip, ið virka í frálandavinnuni, mest ísambandi við seismikkskjóting.